# Norski fiskimálaráðharrin vitjar á Hellunum

**Svein Ludvigsen og Jørgen Niclasen tosa um fiskirættindasáttmálan, sum er millum Føroyar og Noreg og um framtíðarvánir**

ALMENN VITJAN
*Vilmund Jacobsen*



*Norski fiskimálaráðharrin, Svein Ludvigsen, á almennari vitjan hjá Jørgeni Niclasen, fiskimálaráðharra. Við sær úr Noregi hevur hann tvey embætisfólk*

Í hesum døgum hevur Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, vitjan úr Noregi. Gesturin er norski fiskimálaráðharrin, Svein Ludvigsen, sum kom til Føroya seinnapartin sunnudagin.

Hetta er ein almenn vitjan og liður í tí samstarvi, sum er millum Føroyar og Noreg á fiskivinnuøkinum.

Ráðharrarnir og starvsbrøðurnir hittast vanliga til fundar einaferð um árið, skiftivís í Føroyum og Noregi. Hesaferð var tað so túrurin hjá norska fiskimálaráðharranum at vitja í Føroyum.

### Framtíðarvánir

Í tíðindaskrivinum, sum Fiskimálastýrið sendi út, stendur, at samráðingar skuldu vera millum fiskimálaráðharrarnar fyrrapartin í gjár og aftur fyrrapartin í dag, men hetta eru ikki tær árligu samráðingarnar um fiskirættindi, tí sáttmálin millum londini er komin uppá pláss.

Vit fregnaðust tí hjá skrivaranum hjá Jørgeni Niclasen, hvat hesar samráðingar snúgva seg um.

Skrivarin sigur, at fiskimálaráðharrarnir ivaleyst fara at tosa um sáttmálan, sum er millum londini og helst eisini um framtíðarvánir og samstarv annars.

Tvey embætisfólk frá fiskivinnuumsitingini í Oslo eru við Svein Ludvigsen á fundunum í Føroyum og umframt Jørgen Niclasen, eru Kaj P. Mortensen og Jens Helgi Toftum við frá føroyskari síðu.

### Á ferð við Brimli

Tá ið vit tosaðu við Fiskimálastýrið fyrrapartin í gjár, sótu fiskimálaráðharrarnir á fundi saman við embætisfólkum sínum.

Á middegi skuldu gestir og vertir umborð á Brimil, sum skuldi føra ferðalagið norður til Klaksvíkar, har Jákup Sólstein skuldi taka sær av gestunum.

Úr Klaksvík fer Brimil norður á Oyndarfjørð, har ferðalagið verður sett í land á Hellunum í gummibáti. Her er ætlanin at vitja smoltstøðina hjá partafelagnum, Laksá.

Svein Ludvigsen og embætisfólk hansara fara heimaftur seinnapartin í dag.

# Skúlaflokkur vitjaði á Sosialinum

SUMMAR
*Vilmund Jacobsen*



*Nógv børn og nógvar súkklur samlaði uttanfyri hølini hjá Sosialinum í góðveðrinum seinasta fríggjadag*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Beint fyri døgurða seinasta fríggjadag fekk Sosialurin í Saltangará vitjan av 5. flokki við Tofta skúla. Saman við flokslæraranum, Jóhonnu Petersen, høvdu tey verið ein súkklutúr í Lamba, har tey høvdu hugt at »grøvini« hjá Óla Jarnheysi. Søgnin sigur, at Óli sum ungur kom sum húskallur til Lambar í tænastu hjá Mikkjali, bónda, ið var sonur løgmannin, Jógvan Heinason. Óli var úrmælingur, bæði til styrki og treystleika, men hann skal eisini hava verið guðloysingur. Søgnin sigur, at Óli slapp ikki at liggja í kristnari jørð, og er tí grivin í bønum í Lamba. Har søgnin sigur, at Óli skal vera grivin, er í dag ein stórur rabarbugarður.

Eftir at hava vitjað á »grøvini« hjá Jarnheysi, fór 5. flokkur oman á gomlu støðna í Lamba, har lærarinnan greiddi teimum frá um Norsku Løvu, sum fór á land á Lambavík, 31. desember 1707 og gjørdist vrak.

Væl av tilfari er til skjals um Norsku Løvu.

Jóhanna Petersen sigur, at 5. flokkur ætlandi fer at lesa fleiri sagnir og kvæði komandi skúlaár, og ein partur av hesum tilfari fer eitt nú at snúgva seg um Óla Jarnheys og Norsku Løvu.

### At røra seg

Lærarinnan sigur, at eitt annað mál við túrinum so avgjørt var at geva flokkinum møguleika at røra seg.

– Og tá er ein slíkur súkklutúrur sum hesin eitt frálíka gott høvi, sigur hon.

Á veg heimaftur úr Lamba steðgaði 5. flokkur á Sosialinum, men hetta var ein stuttur steðgur. Kortini fingu næmingarnir eitt lítið sindur at vita um Sosialin og blaðarbeiði.

Í túninum tóku vit myndirnar, vit prenta saman við hesum greinastubbanum.



*Flestu næmingarnir í 5. flokki við Tofta skúla vóru við hendan morgunin, men tíverri barst onkrum frá. Flokslærarin, Jóhanna Petersen, er eisini við á myndini*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



Broytingar í rentutryggingarlógini:

# Inngjaldið skattafrítt

**Í framtíðini skal samlaða inngjaldið til eftirløn haldast uttanfyri skattskyldugu inntøkuna hjá løntakaranum**

EFTIRLØN
*Heri á Rógvi*

Reglarnir viðvíkjandi eftirlønum eru nú broyttir nakað. Fyri tann einstaka arbeiðstakaran kemur hetta ikki at merkja nakað. Tað er hinvegin arbeiðsgevararnir, sum fara at leggja hetta til merkis, tí tað verður eitt lítið sindur lættari at halda skil á bókhaldinum.

Við nýggju reglunum, sum komu í gildi 10. apríl, skal løntakarin framyvir ikki taka egin inngjøld til eftirløn við skattskyldugu inntøkuna. Løntakarin hevur tí heldur ikki nakran frádráttarrætt í skattskyldugu inntøkuni, og sleppur nú heilt frá at hugsa um skattligan frádrátt, tá ið talan er um eftirlønir, har arbeiðsgevarin er við.

- Ein løntakari skal ikki, tá ið skattskylduga inntøka hansara verður uppgjørd, taka tey gjøld við, sum hann sjálvur og arbeiðsgevari hansara rinda til arbeiðsgevaraeftirlønarskipan, sum vissar løntakaranum ella avvarðandi hansara eina leypandi árliga eftirlønarinntøku ella eina kapitalútgjalding. Tað er tó ein treyt, at tað í eftirlønarsáttmálanum er tilskilað, at løntakarin ikki kann avhenda, veðseta ella á annan hátt ráða yvir gjaldinum saman við rentum, øðrum vinningi, bonusi v.m., so leingi talan er um eina eftirlønarskipan, sbr. § 1H, og at kreditorar hansara ikki í sama tíðarskeiði kunnu halda seg skaðaleysan í hesum gjøldum, stendur at lesa í stykki trý í Løgtingslóg nr. 51 frá 29. desember 1971 um skatt av rentutryggingum v.m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 40 frá 26. mars 2002.



*Tað verður enn lættari at spara saman til teir gyltu eldradagarnar av lívinum*

# Liðug á Fiskivinnuskúlanum

**Og 1. juli fara fýra næmingar til Skotlands at umboða føroysku litirnar í European Business Game**

SKÚLAR
*Heri á Rógvi*



*Tann nógv umrøddi Fiskivinnuskúlin í Vestmanna byrjar við somu hølum og nýggjari útbúgving eftir summarfrítíðina*

Hósdagin 27. juni kl. 14 fáa ellivu næmingar handað prógv í hægri útbúgving innan fiskivinnu (stytt: HIF). Kaj Leo Johannesen, løgtingsmaður og fiskasølumaður, heldur røðu fyri næmingunum.

Í ár eru liðin ellivu ár síðani, at teir fyrstu næmingarnir fingu prógv frá Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna. 116 fólk hava síðani tikið endaligt prógv á skúlanum.

Seinnu árini hevur ein av aðaltáttunum hjá Fiskivinnuskúalnum verið European Business Game, sum skúlin í fleiri ár hevur vunnið. Lið frá skúlanum hava eisini vunnið evropeisku kappingini.

Aftur í ár eru tað næmingar av Fiskivinnuskúlanum, sum skulu tørna út fyri Føroyar og føroyskar skúlar. Teir fýra næmingarnir, sum er á liðnum, fara 1. juli til Skotlands at luttaka í evropeiska endaumfarinum av kappingini. Kappingin verður í býnum Inverness, og møguleikarnir at vinna skuldu verið góðir.

European Business er ein kapping, har ein bólkur av næmingum skal gera eitt fiktivt virki við einum fiktivum produktið, men alt skal gerast sum um, at tað er veruligt. Roknskapir, skráseting v.m. skal alt gerast.

### Nýggj útbúgving

Nógv hevur verið at hoyrt um Fiskivinnuskúlan seinastu vikurnar, tí hølisviðurskiftini ikki eru nøktandi, men tað var ætlaða keypið av bygningi heldur ikki.

Hvussu er og ikki, so byrja sum støðan er nú sekstan nýggir lærlingar á Fiskivinnuskúlanum í Vestmann eftir summarfrítíðina. Jú, talan er um lærling. Tað er átta alaralærlingar og átta fiskavirkarar. Nøvnin siga kanska mest í sær sjálvum um, hvat lærlingarnir skulu læra um í lærutíðini. Talan verður um, at lærlingar vera eitt ár og tólv vikur á skúlanum, har teir skulu hava lærugreinir á C-støði, sum er lægsta støði á Fiskivinnuskúlanum.

Útbúgvingin byrjar, hóast myndugleikarnir ikki hava fingið greiðu á, hvar og hvussu verður við Fiskivinnuskúlanum.

Útbúgvingin er úrslit av samstarvið millum myndugleikarnar, skúlan og vinnuna.

# Nýggj nevnd fyri Landsbankan

**Fíggjarmálastýrið hevur skipað fyri valið til umsjónarráðið í Landsbanka Føroya**

TÍÐINDASKRIV

Fíggjarmálastýrið hevur við heimild í landsbankalógini skipað fyri valið til umsjónarráðið í Landsbanka Føroya fyri 5 ár við gildi frá 15. mai 2002.

Hesi eru vald av landsstýrinum við tilmæli frá Búskaparráðnum:
Jóan Hendrik Svabo Samuelsen, Jørundsgøta 40, Klaksvík
Una Joensen, Millum Gilja 103, 188 Hoyvík
Annfinn V. Hansen, 180 Kaldbak
Marita V. Rasmussen, Villingardalsvegur 41, 100 Tórshavn
Jóan Pauli Poulsen, Sílagøta 3, 100 Tórshavn

Jóan Hendrik Svabo Samuelsen er somuleiðis valdur í nevndina sum løgfrøðingur og Una Joensen sum búskaparfrøðingur.

Hesi eru vald av valnevndum, sum vinnufeløg hava valt:
Valnevnd 1: Ingeborg Vinther, Tjarnarlág 5-7, 100 Tórshavn
Valnevnd 2: Æna Reinert, Lynggøta 6, 100 Tórshavn
Valnevnd 3: Tummas Eli Høj Joensen, á Gomlulág, 490 Strendur
Valnenvd 4: Vilhelm M. Johannesen, Fútalág 37, 100 Tórshavn
Jógvan Vágsheyg, Heygavegur, 700 Klaksvík
Valnevnd 5: Niels Winther Poulsen, Millum Gilja 8, 188 Hoyvík

Í fráfarna umsjónarráðnum sótu: Jóan Hendrik Svabo Samuelsen, Annfinn V. Hansen, Regin Olsen, Jens Helgi Toftum, Kristina Samuelsen, Elias Hansen, Johannes Ellingsgaard, Eli Davidsen, Vilhelm M. Johannesen, Jógvan Vágsheyg og Jóhan Simonsen

Á fundi 6. juni 2002 skipaði umsjónarráðið seg við Jógvan Vágsheyg sum formanni og Ingeborg Vinther sum næstformanni. 3 fólk vórðu vald í nevndina fyri 1 ár: Vilhelm Johannesen, Vígdis Johannesen og Marita Rasmussen. 2 fólk vórðu vald í umsjónarnevndina at kanna ognir og virki bankans saman við einum limi úr nevndini. Harumframt er Rasmussen & Weihe Spf afturvalt sum grannskoðari.

Í nevndini sita nú: Jóan Hendrik Svabo Samuelsen, Una Joensen, Vilhelm Johannesen, Vígdis Johannesen og Marita Rasmussen.

Á nevndarfundi 17. juni 2002 skipaði nevndin seg við Jóan Hendrik Svabo Samuelsen sum formanni og Vígdis Johannesen sum næstformanni. Marita Rasmussen varð vald í umsjónarnevndina saman við 2 umboðum úr umsjónarráðnum.

Í fráfarnu nevndini sótu: Jóan Hendrik Svabo Samuelsen, Regin Olsen, Jens Helgi Toftum, Annfinn V. Hansen og Vígdis Johannesen.


GÓÐIR BRÚKTIR BILAR

**Nissan Micra 1,0**
grønur, 3 hurðar,
árg. 2000, 27.000 km.
88.000

**Nissan Almera 2,0 Diesel GX**
grønur, 5 hurðar,
árg. 1997, 110.000 km.
110.000

**Nissan Almera 2,0 Diesel GX**
reyður, 4 hurðar,
árg. 1998, 119.000 km.
110.000

**Nissan Primera 1,6**
svartur, 4 hurðar,
árg. 1998, 55.000 km.
110.000

**Nissan Primera 2,0 SLX**
hvítur, 4 hurðar,
árg. 1997, 45.000 km.
105.000

**Nissan King Cab 4x4 DieselTurbo**
blágráur, 2 hurðar,
árg. 1998, 55.000 km.
130.000

**Peugeot 306 Hdi 2,0 St.car**
svartur, 5 hurðar,
árg. 1998, 60.000 km.
120.000

**Peugeot 306 DT 1,9**
bláur, 4 hurðar,
árg. 1997, 150.000 km.
90.000

**Peugeot 605 SRDT 2,1 Aut.**
bláur, 4 hurðar,
árg. 1994, 230.000 km.
120.000

**Opel Corsa 1,4**
reyður, 5 hurðar,
árg. 1996, 105.000 km.
68.000

**Opel Corsa 1,2S**
reyður, 5 hurðar,
árg. 1990, 120.000 km.
10.000

**Opel Corsa 1,6**
bláur, 5 hurðar,
árg. 1995, 109.000 km.
67.000

**Opel Astra 1,7Dt**
beige, 5 hurðar,
árg. 1996, 95.000 km.
85.000

**Opel Astra 1,6**
svartur, 5 hurðar,
árg. 1998, 55.000 km.
105.000

**Opel Vectra 1,4**
hvítur, 4 hurðar,
árg. 1990, 255.000 km.
26.000

**Opel Vectra 2,0 Di**
bláur, 4 hurðar,
árg. 1998, 96.000 km.
130.000

**Subaru 1600**
hvítur, 4 hurðar,
árg. 1989, 104.000 km.
10.000

**Saab 900**
reyður, 3 hurðar,
12.000

**Saab 900 S**
reyður, 5 hurðar,
árg. 1996, 119.000 km.
98.000

**Ford Escort 1,6**
gráur, 3 hurðar,
árg. 1992, 179.000 km.
18.000

Gevið gætur: Bilarnir á listanum kunnu verða seldir
Bilarnir finnast eisini á:
www.nissan.fo

P/F Meinhardt Arge
v/ Oyggjarvegin • Postsmoga 3171
110 Tórshavn • Tel. 31 61 61

Sosialurin